## Erling og Páll koppaðu toppliði

Erling Jacobsen spældi samfullar 90 minuttir, meðan Páll Klettskarð fekk seinasta korterið, tá teir saman við liðfeløgunum bastu einum av toppliðunum í triðbestu donsku deildini. Vanløse endaði við at vinna 2-0 á Avarta, sum er nummar fýra í deildini og einans trý stig frá fremsta plássinum. Við føroyskum brillum er vert at hefta seg við, at Páll Klettskarð ikki byrjaði inni. Hann hevur ikki verið heilt so skarpur seinastu dystirnar sum hann var fyrr í ár, men fekk tó góðar 15 minuttir á vøllinum. Annars er málið hjá Vanløse til 1-0 eisini vert at hyggja nærri at. Staddur á baklinjuni eydnast tað Kenni Pedersen at skjóta bóltin upp um málverjan og í málið. Málið sæst á vanloeseif.dk.

## Løkin, Lava og Næs flyta niður

Nú er einans talan um ein teoretiskan møguleika, um Frem skal bjarga sær í næstbestu donsku fótbóltsdeildini. Frem skal hava fulla úrtøku úr øllum trimum dystunum, sum eftir eru at leika, umframt at liðið eisini skal vinna 14 mál inn á Hvidovre, sum er níggju stig frammanfyri Frem. Hetta er, meiri ella minni, ein ógjørlig uppgáva, hóast liðið í dag vísti hampiligar taktir til tíðir. Tað endaði kortini við enn einum tapi, hesaferð 3-2 í móti Kolding, sum skoraði sigursmálið í yvirtíðini. Teir báðir landsliðsleikararnir Bogi Løkin og Jónas Þór Næs vóru ikki partur av hópinum hjá Frem sunnudagin, ei heldur var skaddi Andreas Lava Olsen.

# Javnt á Argjum

**VODAFONEDEILDIN** AB fekk stig annan heimadystin á rað. Hesaferð ímóti Víkingi



*Argjamenn vístu eitt av bestu avrikunum hetta kappingarárið, ið ognaði teimum eina stigi móti Víkingi*
*Myndir: Álvur Haraldsen*



Heri Simonsen

| | |
|---|---|
| AB | 1 |
| Víkingur | 1 |

Argjamenn hava nú arbeitt seg upp tvey tey seinastu umførini, um enn ikki tað hevur rokkið at førka liðið upp um niðurflytingarstrikuna, so eru fýra stig í tveimum dystum risastór framgongd sammett við tey trý stigini liðið fekk í átta teimum fyrstu dystunum. Javnleikur 1-1 millum AB og Víking var á einari leið.

### Stríddust væl

AB-leikarnir stríddust væl, og teir gjørdu tað sera torført hjá Víkingi at fáa spælið at koyra. Semja var millum argjafólk, at avrikið hjá AB var millum tey bestu í hesum kappingarárinum. Nógvir harðir nærdystir vóru, og menn løgdu nógv fyri. Hjá Víkingi vikarieraði Áslakur R. Petersen fyri tann leikbannaða liðskiparan, Niclas Niclasen. Nakrir málmøguleikar fullu til bæði liðini í fyrra hálvleiki, men hvørki liðið fann netmeskarnar fyrstu 45 minutirnar.

### Stig Roar skoraði aftur

Norski framherjin hjá AB, Stig Roar Søbstad hevur ikki skorað í longri tíð, men tá 10 minuttir vóru farnir av seinna hálvleiki bragdaði aftur hjá honum. Vánaligt samskifti í verjuni hjá Víkingi førdi til, at Stig Roar Søbstad kundi strúka avstað við bóltinum, og hann meddaði bóltin í netið til 1-0 leiðslu til AB. Leiðslan hjá AB helt ikki longi. Áslakur Petersen, sum átti sína lut í málinum hjá AB bøtti um skaðan aftur. Súni Olsen beindi eitt av sínum mongu góðu frísparkum inn í AB-brotssteigin, og har beindi Áslakur bóltin í málið til 1-1. Eftir seinna málið hendi ikki tað stóra í dystinum, og liðini samdust um javnleikin. Javnleikurin lyfti AB uppum niðurflytingarstrikuna í eitt samdøgur, men sigurin hjá B71 yvir B68 háløði AB niður um niðurflytingarstrikuna aftur. Víkingur í sínum lagi, fer nú at fyrireika seg til seinnu hálvfinaluna ímóti ÍF, sum verður spældur týskvøldið 8. juni.

*heris@sosialurin.fo*

## Atli Gregersen:

## Tendraðir mótstøðumenn

Vikarierandi liðskiparin hjá Víkingi, Atli Gregersen helt, at tað merktist á Argjamonnum, at teir vildi hava eitt úrslit. – Vit møta einum AB-liði sum er veruliga tendrað. Teir hava ongantíð vunnið á okkum, og tað ætlaðu teir avgjørt at gera nakað við. Eg helt kortini, at vit »matchaðu« teir rímuliga væl, men samanumtikið var javnleikur eitt rættvíst úrslit. Har vóru nakrir stórir málmøguleikar til bæði liðini, so tað var eitt ella annað stað í lagið, at tað endaði við javnleiki. Atli Gregersen er ikki nøgdur við leikligu gongdina hjá Víkingi seinastu umførini, og hann heldur, at tað minnir um eina leikliga kreppu, sum Víkingur er komið í, men hann hevur vónir um, at tað rættir seg til seinnu hálvfinaluna ímóti ÍF.